

www.oljan.fo

**Jan Müller** 05 - 08 - 2012

# Eiga at útbúgva tey ungu í Føroyum til oljuvinnu

"Ì Føroyum er stórur áhugi fyri oljuvinnuni, og tískil hevði tað verið ynskiligt, um fleiri útbúgvingar kundu verið her - innan oljuvinnuna. Tekniski skúli hevur eina útbúgving, ið kallast framleiðslutøkningur, men vit hava onki tilboð til víðari lestur, og ein má tískil av landinum at lesa, um ein ynskir servitan um oljuvinnu. Hetta er spell, tí vit kundu havt fleiri flokkar gangandi í skúla í Føroyum, heldur enn at lata tey ungu fara av landinum at lesa. sigur tann ungi havnarmaðurin Heini Magnussen, sum sær stórar møguleikar hjá føroyingum í altjóða oljuvinnuni. Oljan.fo hevur tosað við hann. Nógvir føroyingar í oljuvinnuni Alsamt fleiri føroyingar fáa sær arbeiði í olju- og frálandavinnunum. Og tekin eru til, at møguleikarnir komandi árini hjá enn fleiri føroyingum at fáa starv í hesum vinnu eru vaksandi. Men hvat skal til fyri at nema sær starv í hesum vinnum, og hvørji krøv verða sett teimum, sum vilja fara henda vegin, eitt nú hvørjar útbúgvingar. Teir spurningarnar setti olja.fo einum av teimum mongu føroyingum, sum hava fingið fótin fastan í útlendsku oljuvinnuni, Heini Havn Magnussen úr Havn. Heini Magnussen eri 29 ára gamal, er føddur, uppvaksin og búsitandi í Havn. Hann fór í læru sum elektrikari hjá fyritøkuni Elmek í 2004 og bleiv útlærdur í 2008. Hann hevur verið í starvi hjá PAM Offshore Services í knøpp 2 ár. Hann er so í løtuni partur av føroyska handverkarabólkinum, sum ger systurpall hjá Cosl Pioneer, sum borar á landgrunninum, lidnan. Hesin pallurin eitur Cosl Promoter og hevði oljan.fo herfyri myndafrásøgn frá pallinum. Krøv Heini Magnussen vil fegin greiða øðrum føroyingum frá arbeiðinum og krøvunum, sum eru galdandi í oljuvinnuni. Vit geva honum orðið - Um ein hevur hug til at royna arbeiðslívið í oljuvinnuni sum handverkari, skal ein lúka ymisk krøv. Millum annað er eitt krav nógvastaðni, at ein hevur eitt sokallað DSB. Eitt DSB er ein norsk góðkenning, sum gevur útlendingum loyvi til at virka sum handverkari í

oljuvinnuni á landi. Hendan góðkenning kann einans latast fólki, sum hevur í minsta lagi 2 ára starvsroyndir sum útbúgvin handverkari, og hesa góðkenning kann ein søkja um á norska DSB kontórinum. Vælumtóktir í Norra Føroyingar eru sera væl umtóktir í Norra, og hetta kemur helst av, at føroyskir handverkarar duga sítt handverk væl. Lærutíðin hjá føroyskum handverkarum er ein góð samanseting at teori og praksis, og her eru vit væl frammanfyri nógv av hinum londunum rundanum okkum. Ì hinum londunum hava tey satsað nógv uppá tann teoretiska partin av útbúgvingini  men gloymt tann praktiska. Maskinmeistarar vænta í stórum stíli í oljuvinnuni, og hesa útbúgvingina hava vit í Føroyum. Føroyskir maskinmeistarar og verkfrøðingar eru eisini sera væl umtóktir í frálandavinnuni. Nógvar útbúgvingar Fleiri aðrar útbúgvingar kundu verið relevantar at havt í Føroyum eitt nú Offshore Manager. Ì Føroyum er stórur áhugi fyri oljuvinnuni, og tískil hevði tað verið ynskiligt, um fleiri útbúgvingar kundu verið her - innan oljuvinnuna. Tekniski skúli hevur eina útbúgving, ið kallast framleiðslutøkningur, men vit hava onki tilboð til víðari lestur, og ein má tískil av landinum at lesa, um ein ynskir servitan um oljuvinnu. Hetta er spell, tí vit kundu havt fleiri flokkar gangandi í skúla í Føroyum, heldur enn at lata tey ungu fara av landinum at lesa. Oljuvinna kring knøttin Arbeiði í oljuvinnuni er ikki bara í Norra, men fevnir víða umkring allan knøttin, og fleiri og fleiri føroyingar royna hesar leiðir. Hetta er bæði gevandi og mennandi fyri handverkarar og samfelagið sum heild. Nýggj vitan og aðrar avbjóðingar í gerandisdegnum hava nógv at siga, tá ið tosað verður um framgongd og búskaparligan vøkstur, og alt bendir á, at Føroyar verða oljuvinnutjóð burturav, um ikki so nógv ár. Tá ræður um at hava ta vitan, royndir og ta tøkni, ið krevst fyri at menna okkum víðari, sigur ein sera skilagóður og jaligur Heini Havn Magnussen í samrøðuni við oljan.fo. Mynd Heini Havn Magnussen umborð á Cosl Promoter og aðrir føroyingar umborð eisini